# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Sarah Palin hevur ikki fylgt við tí politiska orðaskiftinum í USA tey seinastu tíggju árini*

*(Kelda við CNN)*

# Amerikanarar vápna seg áðrenn Obama tekur við

**Nógvir amerikanarar vænta, at Barrack Obama fer at herða vápnalógina, og tí keypa fleiri sær vápn, áðrenn nýggi forsetin tekur við**



*Barrack Obama fer helst at royna at herða ta lagaligu vápnalógina*

*Mynd: AP*

Hagtølini hjá samveldisløgregluni FBI vísa, at vápnasølan í USA vaks munandi, tá tað gjørdist greitt, at Barrack Obama fór at vinna forsetavalið. FBI sigur, at tann seinasta mánaðin undan valinum seldu vápnahandlarnir næstan 1,2 millión hondvápn. Tað er umleið 15 prosent meiri enn vanligt, og bæði FBI og vápnahandilsmenninir halda, at fólk vildu tryggja sær vápn, áðrenn Obama fær stundir til at herða galdandi vápnalóg.

- Tað er einki at ivast í, at tann stóra vápnasølan hevur samband við forsetavalið. Vit sóu týðiliga, at tess nærri vit komu valinum, og tess greiðari tað bleiv, at Obama fór at vinna, tess fleiri vápn vórðu seld, sigur Tony Aeschliman, sum er talsmaður fyri felagsskapin National Shooting Sport Foundation.

Hann leggur afturat, at vápnahandlar um alt landið siga seg hava havt metsølu tann seinasta mánaðin, og tað vátta handilsmenninir.

- Fólk vænta, at vápnalógin verður herd. Grundlógin gevur okkum rætt til at hava skotvápn, men Obama fer at royna at taka tann rættin frá okkum, sigur ein vápnahandilsmaður í Houston í Texas við NTB.

Í vápnahandlinum Continental Arms í býnum Baltimore ivast tey heldur ikki í, at valsigurin hjá Obama hevur ávirkað vápnasøluna.

- Fólk siga einki, men eg eri sannførdur um, at valsigurin hjá Obama hevur gjørt sítt, tí øll vita, at hann er ímóti skotvápnum, sigur handilsmaðurin.

## Banna summum vápnum

Undir valstríðnum vissaði Barrack Obama amerikanararnar um, at hann virðir grundlógina, men sum lokalpolitikari í statinum Illinois atkvøddi hann fleiri ferðir fyri at herða reglurnar um, hvørji vápn handlarnir kunnu selja.

Tey, sum eru fyri at varðveita verandi vápnalóg, vænta, at Obama fer at leggja uppskot fyri Kongressina um at banna einstøkum skotvápnum, eitt nú ávísum riflum. Tey vísa á, at demokratarnir hava meiriluta bæði í Senatinum og Umboðsmannatinginum, og tí kann Obama fáa slík herðandi uppskot samtykt.

Tony Aeschliman sigur við NTB, at tá Bill Clinton tók við forsetaembætinum fyri átta árum síðani, vaks vápnasølan eisini nógv, tí eisini tá væntaðu fólk, at tann nývaldi forsetin fór at herða vápnalógina.



*Miriam Makeba*

*Mynd: AP*

# Mama Africa deyð

**Tann kenda suðurafrikanska songkvinnan Miriam Mekeba doyði í nátt, 76 ára gomul**

Miriam Makeba, sum var kend undir navninum „Mama Africa“, kendi seg illa aftan á eina konsert í Italia í gjárlvøldið. Hon bleiv alt fyri eitt flutt á sjúkrahús, og har doyði hon í nátt.

Miriam Makeba, sum var fødd í Johannesburg í 1932, gjørdist kend, tá hon og suðurafrikanski bólkurin The Manhattan Brothers vóru á konsertferð í USA í 1959.

Hon stríddist ímóti tí hvíta apartheid-stýrinum í Suðurafrika og noyddist at búgva í útlegd í 31 ár.

# Jødisk niðursetufólk løgdu á seks ára gamlan smádrong

Tað eydnaðist ísraelskum hermonnum at hjálpa dronginum á eitt sjúkrahús

Støðan millum jødisk niðursetufólk og palestinar á Vestara Áarbakka hevur verið spent í seinastuni, og fleiri ferðir hava ísraelskir hermenn verið noyddir at forða jødiskum niðursetufólkum í at gera seg inn á sivilar palestinar.

Leygardagin komu hermenninir tó ov seint, tá nøkur jødisk niðursetufólk løgdu á ein seks ára gamlan palestinskan drong í býnum Hebron. Eygnavitni søgdu frá, at niðursetufólkini steinaðu drongin, men at tey tóku til rýmingar, tá ísraelskir hermenn komu dronginum til hjálpar og fluttu hann á sjúkrahús. Hann hevði tó ikki fingið stórvegis skaða.

Bilal Dana varð álopin tætt við jødisku niðursetubygdina Kiryar Arba, sum er nærhendis palestinska býnum Hebron, og her hava viðurskiftini millum niðursetufólkini og palestinararnar verið serliga spent. Jødisk niðursetufólk hava fleiri ferðir lopið á palestinar og ísreaelskar hermenn, skrivar NTB. Ísraelski verjumálaráðharrin, Ehud Barak, hevur sagt, at herurin fer ikki at slaka.



*Ísraelskir hermenn fluttu drongin á sjúkrahús*

*Mynd: AP*

## STUTT SAGT

### Úrslitið ein amerikanskur sigur

George W. Bush, forseti, sigur seg vera sera fegnan um úrslitið av forsetavalinum í síðstu viku. Hóast hann ivaleyst vildi hava floksfelagan John McCain at vinna valið, sigur Bush, at sigurin hjá Barrack Obama er ein sigur fyri amerikanska søgu, sum hann orðar tað sambært AP.

Í síni vikuligu útvarpsrøðu segði tann fráfarandi forsetin, at amerikanararnir hava valt ein forseta, sum umboðar ein sigur fyri amerikanska søgu. Hann legði afturat, at valið seinasta týsdag vísir, at hart arbeiði og bjartskygni geva úrslit, og at fólk framvegis hava álit á USA.

- Saman við tí amerikanska fólkinum ynski eg tí komandi forsetanum eydnu, og Laura og eg vóna, at Obama-húskið fær líka nógva gleði í hesum undurfullu húsum, sum vit hava havt, segði tann fráfarandi forsetin.

Bush, sum fer frá tann 20. januar, hevur sagt, at hann mog hansara umsiting fara at veita tí komandi forsetanum og fólki hansara allan tann stuðul og alla ta hjálp, sum tey biðja um. Demokraten Obama afløser Bush på præsidentposten 20. januar.

### Mintust krystall náttina

Um vikuskiftið varð skipað fyri einum serligum tiltaki í Berlin, har nógvir týðandi týskarar við Angelu Merkel, kanslara á odda mintust 70 ára dagin fyri ta tiltiknu Krystallnáttina tann 10. november í 1938.

Ta náttina fóru nazistar herjandi um alt Týskland, har teir løgdu á hús, ognir og fyritøkur, sum jødar áttu. Fleiri hundrað jødisk samkonuhús vórðu brend í grund, umleið 90 jødar vórðu myrdir, og umleið 30.000 aðrir vórðu handtiknir og fluttir í fangalegur, har teir flestu seinni vórðu tiknir av døgum.

Tiltakið í Berlin var í tí størsta jødiska bønhúsinum í býnum. Angela Merkel helt røðu. Hon segði millum annað, at tað, sum hendi Krystallnáttina, eigur at fáa týskarar at venda sær ímóti øllum, sum yvirhøvur minnir um jødahatur.

Umleið seks milliónir jødar lótu lív í seinna heimsbardaga og árunum undan bardaganum.